

*Hugskotið til ein serliga høgligan bjargingarring tryggjaði spf/Secura fyrstaplássið í føroyska umfarinum av Euopean Business Games*

*Mynd: www.klaksvik.fo*

# Secura vann føroyska European Business game

**Tað verður spf/ Secura, sum skal umboða Føroyar í altjóða kappingini European Business games í Italia í summar**

EUROPEAN BUSINESS GAMES
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Við einum serliga høgligum bjargarringi, vann spf/ Secura á Tekniska Skúla í Klaksvík føroyska umfarið av kappingini European Business Games.

### Til Italia

Vinnarin varð funnin á samkomu í býráðshøllini í Klaksvík fríggjadagin, eftir at ein dómsnevnd hevði mett um framløgurnar av ymsu verkætlanunum.

Vinnandi bólkurin fer víðari til altjóða kappingina European Business Games, sum verður hildin í Bolzani í Italina í summar.

### Spf/Secura er mannað av:

Jógvan Sámal Poulsen, stjóri
Evald Johannesen, fíggjarstjóri
Jón Kamar Joensen, tekniskur leiðari
Súsanna Árnadóttir Joensen, marknaðarleiðari
Bergur Ingmarson Johansen, framleiðslustjóri

Føroyska endakappingin í European Business Games er eitt samstarv millum Mentamálaráðið, Ívertsetarahúsið og Tekniska Skúla í Klaksvík.

Rani Nolsøe, stjóri í Íverksetarahúsinum handaði vinnarunum blómutyssi og gav vinnandi luttakarunum harumframt eitt ókeypis skeið í Íverksetarahúsinum.

# Víðka veðurtíðindi frá Vága Floghavn

**Veðurtíðindini frá Vága Floghavn umfata nú eisini mesta og minsta hita, sýnið og skýggjaloftið**

VEÐUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Á heimasíðuni hjá Vága Floghavn hevur í longri tíð verið gjørligt at síggja ættina, vindmegina, hitan, døggpunktið og lufttrýstið máld hvønn tíma.

Nú er gjørligt eisini at síggja mesta hita, minsta hita, sýnið og skýggjaloftið á heimasíðuni.

### Til gagn fyri øll

Broytingin ber eisini í sær, at upplýsingarnar nú eru fyri hvønn hálva tíma í staðin fyri hvønn tíma.

Harafturat síggjast upplýsingarnar í grafiskum myndum, ið gevur eina góða mynd av, hvussu broytingin (tendensurin) í veðrinum hevur verið seinastu 12 tímarnar.

Veðurtíðindini eru fyrst og fremst eitt ískoyti til tær veðurupplýsingar, ið flogmanningarnar hava brúk fyri, tá tær skullu til og úr Vágum.

Tó kunnu fólk bæði á sjónum og á landi eisini hava gagn av hesum.

Veðurtíðindini finnast á forsíðuni ella við at trýsta á Veður í vinstru síðu á *www.floghavn.fo*

# Slangorðabók vann kappingina Ungt Virki

**Slangorðabókin hjá virkinum Hvista, tryggjaði fimm ungfólkum á Tekniska Skúla í Klaksvík fyrstaplássið í kappingini Ungt Virki**

UNGT VIRKI
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Tað verður virkið Hvista og teirra slangorðabók, sum skulu umboða Føroyar í donsku kappingini Ung Virksomhed seinni í ár.

Tað varð greitt, tá vinnararnir av kappingini Ungt Virki vórðu avdúkaðir leygardagin á Torginum í SMS, har virkini hava sýnt sínar vørur.



*Slangorðabókin Hvista skal umboða Føroyar í donsku kappingini Ung Virksomhed seinni í ár*

### Alt stríðið vert

Í grundgevingini fyri at lata Hvista fyrstaplássið løgdu dómararnir dent á, at hugskotið við slangorðabókini var serliga gott, umframt at fyritøkan hevði dugað sera væl at skipa sítt virksemi og marknaðarføringina av orðabókini.

Tey fimm ungfólkini vænta ikki, at tað verður nakar trupulleiki at fara uttanlands við eini føroyskari orðabók at kappast.

- Vit fara fyrst og fremst at leggja dent á sjálvt hugskotið við eini slangorðabók. Eisini er ætlanin seinni at gera eina danska og kanska eisini eina enska útgávu av bókini, sigur Herborg Hansen, marknaðarleiðari í Hvista.

Manningin í Hvista dylur ikki yvir, at tey hava lagt nógv arbeiði í hesa verkætlanina og at tað til tíðir hevur verið strævið at seta egið virkið á stovn. Men tá vinnarin varð avdúkaður leygardagin, var lítil møði at hóma hjá teimum fimm ungfólkunum.

- Hetta hevur verið alt stríðið vert, vóru tey á einum máli um.

Nummar tvey í kappingini gjørdist fyritøkan Sirious við einum serligum roykalarmi, meðan triðjaplássið fór til virkið Savon, ið hevur framleitt eina sápu úr seyðatálg.



*Nummar trý í kappingini Ungt Virki gjørdist virkið Savon, ið hevur framleitt eina sápu úr seyðatálg.*

### Ungt Virkið

Ungt virkið er árlig kapping millum næmingar á Tekniska Skúla í Klaksvík, Handilsskúlanum í Havn og Handilsskúlanum á Kambsdali. Næmingarnir skulu byrja sítt egna virki undir somu treytum, sum virkir vanliga verða stovnað og eisini framleiða eina vøru, sum virkið kann selja.

Í døgunum 13. til 15. mars sýndu virkini sínar vørur fram á Torginum í SMS, har tey eisini løgdu sína virkisverkætlan fram fyri eini dómsnevnd.

Vinningurin var eitt pláss í kappingini Ung Virksomhed í Danmark seinnni í ár, har Hvista síðani skal kappast um eitt plás í Europeisku kappingini Young Enterprise. Vinnarin av tí kappingini verður kosin Company of the Year.

**Nýtt!**
**Elektroniskt kotulás**
Ver tryggur við einum elektroniskum lási frá okkum.



Lásini fáast eisini til fingraavtrykk!

**Heilt nýggj og øðrvísi lás!**
Høg góðska og tryggleiki uttan nýtslu av lyklum. 10 ymiskar kotur, vel tølini (1-10) sjálv/-ur. Passar til vanligar lásakassar. Kann setast í inn- og úthurðar. Tolir veður og vind. Kann latast upp bæði uttanífrá og innanífrá við kotu. Kann eisini fáast við alarmskipan.
Vælegnað til barnafamiljur, almennar stovnar og fyritøkur. 2 ára garanti

Valdemar Lützen Byggibúð
Skálatrøð 14 Tel 30 10 20 · vlb@vlb.fo



Les Sosialin so ert tú við